Løgmálaráðið

Dagfesting: 26.10.2025
Mál nr.: 25/23998
Málsviðgjørt: NF

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1
§ 3. Overtrædelse af denne Lovs Bestemmelser straffes med Bøder. Bøderne tilfalder Statskassen.	Í lov nr. 677 af 22. december 1919 om Forbud mod Videresalg af Billetter til offentlige Forlystelser, sum broytt við lov nr. 127 af 15. april 1930 og løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 3, stk. 2 orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Sektirnar fara í landskassan."
	§ 2
§ 67. Sektarpeningur, álagdur við heimild í hesi løgtingslóg, verður býttur eftir galdandi avtalu millum donsku stjórnina og landsstýrið.	Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. mai 2025, verður § 67 orðað soleiðis: "**§ 67.** Sektir álagdar við heimild í hesi løgtingslóg fara í landskassan."
	§ 3
§ 3. Den Husejer eller Lejer, der ikke efterkommer sin Pligt til at afgive de ham i	Í lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om

Henhold til denne Lov afkrævede Oplysninger, eller som afgiver urigtige eller mangelfulde Oplysninger, ifalder Bøder. Afgivelsen af de begærede Oplysninger kan om fornødent fremtvinges ved Dagmulkter. Bøder og Dagmulkter tilfalder statskassen.	husleje m.v., sum broytt við lov nr. 127 af 15. april 1930 og lov nr. 186 af 7. juni 1958, verður § 3, stk. 2 orðað soleiðis: "Sektir og dagsektir fara í landskassan."
§ 41. --- *Stk. 2.* --- *Stk. 3.* Alle Bøder efter denne Anordning tilfalder Statskassen.	**§ 4** Í anordning nr. 468 af 8. november 1921 om hvorved lov om arveafgift af 27. maj 1908 sættes i kraft på Færøerne, sum broytt við anordning nr. 272 af 14. maj 1986, løgtingslóg nr. 13 frá 1955 og løgtingslóg nr. 124 frá 7. desember 2012, verður § 41, stk. 3 orðað soleiðis: "*Stk. 3*. Sektir eftir hesi fyriskipan fara í landskassan."
§ 6. Den, der forsømmer at give de Oplysninger, som han er pligtig at give, eller som med Forsæt giver urigtige Oplysninger, kan idømmes Bøde fra 10 Kr. Bøderne tilfalder Statskassen.	**§ 5** Í lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik verður § 6, 2. pkt. orðað soleiðis: "Sektir fara í landskassan."
§ 16 Stk. 1. --- Stk. 2. --- Stk. 3. --- Bøderne, saavel idømte som vedtagne, tilfalder Statskassen og Kommunekassen med Halvdelen til hver.	**§ 6** Í lov nr. 272 af 6. maj 1921 om Pantelaanervirksomhed og Handel med brugte Genstande verður § 16, stk. 4 orðað soleiðis: "*Stk. 4*. Sektirnar, bæði álagdar og viðtiknar, fara í landskassan og kommunukassan, helvtina til hvønn."
§ 21. --- *Stk. 2.* Bøderne tilfalder Statskassen.	**§ 7** Í anordning nr. 224 af 5. oktober 1936 for Færøerne om offentlig Auktion ved Auktionsledere, sum broytt við anordning nr. 133 af 7. maj 1958, anordning 386 af 26. september 1970 og § 21 løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 21, stk. 2 orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Sektir fara í landskassan."

§ 15. Overtrædelse af denne Anordning eller af de i Medfør af denne udfærdigede Bestemmelser straffes med Bøde, under skærpende Omstændigheder og i Tilfælde af gentagen Overtrædelse kan Straffen stige til Fængsel i indtil 6 Maaneder. Bøderne tilfalder Statskassen.	**§ 8** Í anordning nr. 49 af 19. februar 1934 for Færøerne om Gifte og andre for Sundheden farlige Stoffer, sum broytt við § 19 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og § 4 í løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verður § 15, stk. 2 orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Sektir fara í landskassan."
§ 6. Hann, sum ger skaða á skógfriðingarskyldugt lendi, eitt nú inn á vøkstur, dýr, stik ella annað, kemur undir bót, sum fer í ríkiskassan og má haraftrat endurgjalda skaðan. Undir somu bót kemur hann, sum ger seg inn á skógfriðingarskyldugt lendi. (Strikað).	**§ 9** Í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir, sum broytt við lóg nr. 186 frá 7. juni 1958, løgtingslóg nr. 58 frá 22. august 1975, § 5 í løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 og § 2 í løgtingslóg nr. 149 frá 19. desember 2023 verður § 6 orðað soleiðis: **"§ 6.** Hann, sum ger skaða á skógfriðingarskyldugt lendi, eitt nú inn á vøkstur, dýr, stik ella annað, kemur undir sekt, sum fer í landskassan og má haraftrat endurgjalda skaðan. *Stk. 2.* Undir somu sekt kemur hann, sum ger seg inn á skógfriðingarskyldugt lendi."
§ 16. --- *Stk. 2.* Brot móti hesi reglu hevur við sær sekt, sum fer í ríkiskassan. **§ 18.** --- *Stk. 2.* --- *Stk. 3.* Brot móti hesum reglum hava við sær sekt, sum fer í ríkiskassan. **§ 19---** *Stk. 2.* Brot móti hesum reglum hava við sær sekt, sum fer í ríkiskassan.	**§ 10** Í løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn, sum broytt við lóg nr. 186 frá 7. juni 1958 og løgtingslóg nr. 36 frá 2. juni 1970 verður í § 16, stk. 2, § 18, stk. 3 og § 19, stk. 2 "ríkiskassan" broytt til: "landskassan".
	§ 11 Í løgtingslóg nr. 29 frá 26. november 1953 um tekniskar innleggingar, sum broytt við lóg nr. 186 frá 7. juni 1958, løgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 og § 3 í løgtingslóg nr.

§ 8. --- Sektir sum standast av hesi lóg fara í ríkiskassan.	149 frá 19. desember 2023 verður í § 8, stk, 2 "ríkiskassan" broytt til: "landskassan".
§ 6. --- Sager angaaende deslige Overtrædelser behandles paa det Sted, hvor Skibet eller de for Overtrædelsen sigtede træffes. Bøderne tilfalde Statskassen.	**§ 12** Í lov nr. 54 af 15. februar 1895 om Forholdsregler til Beskyttelse af undersøiske Telegraf- og Telefonledninger, sum broytt við lov nr. 134 af 10. maj 1915, lov nr. 127 af 15. april 1930, lov nr. 72 af 5. marts 1979 og § 4 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 6, stk. 2, 2. pkt. orðað soleiðis: "Sektir fara í landskassan."
§ 16. Um ikki hægri revsing er ásett sambært aðrari lóggávu, verða brot á hesa lógina revsaði við sekt, tó so at brot á § 1 kann hækka til fongsul í 2 mánaðir. Sektir falla til ríkiskassan.	**§ 13** Í lov nr. 81 af 30. marts 1895 for Færøerne om tilsyn med udvandreres befordring, sum broytt við lov nr. 127 af 15. april 1930, § 5 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og § 1 løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verður § 16, 2. pkt. orðað soleiðis: "Sektir fara í landskassan."
§ 2. --- Hvis sidstnævnte mod bedre Vidende eller med Tilsidesættelse af almindelig Agtpaagivenhed bortauktionerer udenlandske Haveprodukter eller udenlandsk Frugt, straffes han med Bøder, der tilfalde Statskassen.	**§ 14** Í lov nr. 71 af 7. april 1899 om Salg af indenlandske Haveprodukter og indenlandsk Frugt ved offentlig Auktion, sum broytt við lov nr. 127 af 15. april 1930, lov nr. 186 af 7. juni 1958 og § 8 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 2, 3. pkt. orðað soleiðis: "Um seinast nevndi móti betri vitan ella við at seta til viks vanligt eftiransni, selur á uppboðssølu útlendskar garðvørur ella útlendskar fruktir, verður hann revsaður við sekt, sum fellur í landskassan."
	§ 15 Í lov nr. 139 af 7. maj 1937 om Kontrol med Tilvirkning af Krigsmateriel m.m., sum broytt við § 22 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og § 5 í løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verður § 11 orðað soleiðis:

§ 11. *Stk. 1.* Overtrædelse af de i denne Lov indeholdte eller i Medfør af samme givne Besemmelser straffes med Bøde eller under skærpende Omstændigheder med Fængsel indtil 1 Aar, hvorhos ulovligt fremstillede eller forhandlede Genstande eller Stoffer kan inddrages til Fordel for Statskassen. I Tilfælde, hvor saadan Inddragning ikke kan ske, kan den skyldige tilpligtes at betale et til Værdien svarende Beløb. *Stk. 2.* Bøderne tilfalder Statskassen.	"**§ 11.** Brot á ásetingar í hesi lóg ella reglum ásettar við heimild í hesi lóg verða revsað við sekt ella undir skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 1 ár, og í hesum føri kann hald verða lagt á ólógliga framleiddar ella handlaðar lutir ella evni, til frama fyri landskassan. Í teimum førum, har slíkur inndráttur ikki kann fremjast, kann tí seka verða álagt at rinda eina upphædd, sum svarar til virðið. *Stk. 2.* Sektirnar fara í landskassan."
§ 17. --- *Stk. 2.* --- *Stk. 2.* Bøderne tilfalder statskassen.	**§ 16** Í lov nr. 169 af 18. maj 1937 for Færøerne om Benyttelse af Indsøer og Vandløb, sum broytt við lov nr. 186 af 7. juni 1958, lov nr. 92 af 23. februar 1988, løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 og § 23 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 17, stk. 3 orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Sektir fara í landskassan."
§ 16. Overtrædelser af de paa Grandestævne oprettede Vedtægter bliver, for saa vidt der ikke ifølge den øvrige Lovgivning er forskyldt anden Straf at straffe med Bøder, som tilfalder Statskassen. *Stk. 2-4.* ---	**§ 17** Í lov nr. 170 af 18. maj 1937 for Færøerne om Grandestævne m.m., sum broytt við lov nr. 186 af 7. juni 1958, lovbekendtgørelse 555 af 1. november 1984 og § 24 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 16, stk. 1 orðað soleiðis: "Brot á viðtøkur, samtyktar á grannastevnu, verða, um ikki onnur revsing er skyldug eftir aðrari lóggávu, revsað við sekt, sum fellir til landskassan."
	§ 18 Í lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 31. mars 1949, løgtingslóg nr. 30 frá 17. marts 1951, lov nr. 186 af 7. juni 1958, lov nr. 242 af 7. juni 1963, lovbekendtgørelse nr. 555 af 1. november 1984, § 25 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og § 19 í løgtingslóg nr. 66 frá 30. mai 2024, verður § 34, 5. pkt. orðað soleiðis:

§ 34. ---. Overskuddet leveres Politiet (Politimester, Sysselmand, Sognefoged), som har at udbetale det til Dyrets Ejer, saafremt denne melder sig inden 1 Aar efter Indsættelsen; melder han sig ikke inden denne Frist, tilfalder det Statskassen.	"Yvirskotið verður latið politinum, t.e. fútanum ella sýslumanninum, sum skal rinda djóraeigaranum hetta, um hesin boðar frá innan 1 ár eftir innlatanina. Boðar hesin ikki frá innan hesa freist, fer yvirskotið í landskassan."
§ 48. --- *Stk. 2.* --- *Stk. 3.* --- *Stk. 4.* Alle Bøder efter denne Lov tilfalder statskassen. Ved Overtrædelse af § 20 skal tillige de Faar, som ulovligt holdes i Særeje, være forbrudt til vedkommende sogns hjælpekasse.	**§ 19** Í lov nr. 172 av 18. maj 1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m., sum broytt við midlertidig bekendtgørelse nr. 6 af 4. januar 1944, lov nr. 186 af 7. juni 1958, løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962, lovbekendtgørelse nr. 555 af 1. november 1984, § 14, stk. 2 í løgtingslóg nr. 82 frá 19. juni 1990, løgtingslóg nr. 77 frá 25. mai 2009, § 26 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og § 2 í løgtingslóg nr. 92 frá 7. mai 2025 verður § 48, stk. 4, 1. pkt. orðað soleiðis: "Sektir álagdar við heimild í hesi lóg fara í landskassan.
	§ 20 Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.